# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

## Bilaradio á Rás2

*Hósdagin kl. 16.05 verður samrøða við Jógvan Olsen og Kari Nielsen frá Tórshavnar býráð, við Jan Danielsen frá kamping.fo og Sámal av Reyni frá Reyni Service. Eisini verður samrøðavið Óla Karl Hansen frá OK Heilsølu*



*Jógvan Olsen frá Lendisdeildini hjá Tórshavnar býráð og Kari Nielsen, sum er bilførari á Mega elbilinum*



# Mega elbilur

**Lendisdeildin hjá Tórshavnar býráð hevur í løtuni ein elbil koyrandi í høvuðsstaðnum. Hesin lítli Mega Mulittruck verður brúktur til gartnaraarbeiði í miðbýnum**



*Í lastini er pláss til tað heila, sum ein býargartnari hevur brúk fyri*

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Meðan bilverksmiðjur kring um í heiminum í hesum døgum leggja um til framleiðslu av hybrid- og elbilum hava vit í Føroyum fingið tann fyrsta elbilin, sum er skrásettur á føroyskum nummarplátum.

Talan er um ein lítlan eldrivnan Mega Multitruck lastbil við vippu, sum lendisdeildin hjá Tórshavnar Býráð leigar frá OK Heilsølu í Hvalvík, sum umboðar hesar bilar í Føroyum.

Bilurin verður brúktur til gartnaraarbeiði í miðbýnum í Havn. Tað er Kari Nielsen sum dagliga koyrir við bilinum. Kari sigur, at bilurin roynist væl í býnum. Hon fær havt øll tey neyðugu amboðini við í lastini, umframt sekkir við burturkasti. Bilurin kann eisini vippa eins og aðrir "ordiligir" lastbilar.

Bilurin hevur 48V elmotor sum verður drivin av 12V battaríum. Hann koyrir upp til 50 km/t og 60-80 km upp á eina løging. Vit hava royndarkoyrt bilin, sum er so at siga ljóðleysur. $CO_2$-útláti er 0,0 gr/km.

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.05 er samrøða við Jógvan Olsen frá Lendisdeildini hjá Tórshavnar býrað og við Kari Nielsen frá gartnaraliðnum, sum dagliga koyrir bilum.



*Kari setur bilin at løða*



*Óli Karl Hansen frá OK Heilsølu umboðar Mega elbilarnar í Føroyum*